Jóansøkuskráin 2004



Tórsdagin 24. juni

Kl. 19.00 Skemtidystur millum: Suðuroyar Sjúkrahús, Suðuroyar Røktarheim og Heimarøktina.

Fríggjadagin 25. juni

Kl 15.00 - 21.00 Printa myndir á t-shirt, meðan tú bíðar, - í høli við høvðusvegin.
Kl 17.00 - 20.00 Sjósavnið á Seglloftinum í Stóra Pakkhús.
Kl 17.00 - 23.00 Vatnskutarar á fjørðinum - leigast á kaiøkinum.
Kl. 18.00 VB - Sumba - Old Girls
Kl.19.00 Pisufundur vid Minnisvarðan, Rakul Borg fyri studentanar, og JóanesEidisgaard,
Løgmaður, flyta fram røðu.
Kl 19.00 VB - TB, 2.deild - menn
Kl.19.30 TIVOLI letur upp á kaiøkinum.
Kl 21.00 OPEN BY NIGHT, handlarnir í Vági lata aftur.
Kl 21.00 VB - TB, oldboys.
Kl.21.00 Bethel, útimøti.
Kl 21.30 Livandi tónleikur í TIVOLI.
Kl.24.00 Dansur í VB húsinum. Strange Fruit spælir.

Leygardagin 26. juni

Kl 10.00 - 23.00 Vatnskutarar á fjørðinum - leigast á kaiøkinum. Steðgur meðan róð verður.
Kl 12.00 Handlarnir í Vági lata aftur.
Kl 12.00 - 13.45 Binding av blómukransum fyri gentur og dreingir undir skúlaaldur uttanfyri Gamla skúla. Heitt verður á tey luttakandi um at hava eitt blómutyssi við (t.d sóljur, summardáar og hagasólju). Tað er eitt ynski at foreldur hjálpa til. Ókeypis atgongd. Kunningarstovan skipar fyri.
Blomsturbørnini verða við í skrúðgonguni út til setanina av Jóansøkuni.
Kl.12.00 Café One Way, hevur sølu av breyði o.ø. í Zion.
Kl.13.45 Skrúðgonga frá Gamla skúla út til Minnisvarðan, við luttøku av yrkis- og áhugabólkum.
Allir luttakarir møta kl. 13.00.
Kl. 14.00 Óli Holm setur Jóansøkuna. Tvøroyar Hornorkestur og Ljómur luttaka við sangi og tónleiki.
Kl 14.00 - 21.00 Printa myndir á t-shirt, meðan tú bíðar, í høli við høvðusvegin.
Kl. 14.30 TIVOLI letur upp á kaiøkinum.
Kl. 14.30 Skótarnir hava loppumarknað og Café / Grill á kaiøkinum.
Kl. 15.00 - 18.00 Rundvísan í Suduroyar Ullvirki - søla av Sirri klæðum.
Kl. 15.00 FM kappróður. Aftaná kappróðurin handar Jóanes Eidesgaard, løgmaður, steypini.
Kl 15.00 Fiskasuppa fæst til keyps umborð á Johannu TG 326.
Kl 15.00 -18.00 Ponyriðing á skúlalagnum
Kl 16.00-20.00 Suðuroyar RC-felag. Framsýning í svimjihylinum.
Kl. 17.00 - 20.00 Skálin vid Skálá hevur framsýning av Ruth Smith-savninum í Gamla skúla.
Kl 17.00 - 20.00 Sjósavnið á Seglloftinum í Stóra Pakkhús.
Kl. 17.00 - 20.00 Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir hevur málningaframsýning í Kunningarstovuni (Gamli skúli).
Kl 18.00 Livandi tónleikur í TIVOLI (eftir steypahandanina). Ymiskir tónleikarar.
Kl 18.30 Fótbóltur, VB- GÍ, 1. deild.
Kl 18.00 - 20.00 Sløkkiliðsbilarnir, frá 1976 og 2004, sýnast fram hjá Bjargingarfelagnum.
Kl 19.00 Útimøti vid Bethel.
Kl 20.00 Missionshúsið, útimøti við Posthúsið
Kl 21.00 Frelsunarherurin, útimøti vid Posthúsið.
Kl 21.00 Tónleika Café í Stóra Pakkhúsið, luttøku av Guðrun Sólju Jacobsen o.ø.
Kl 21.00 Livandi tónleikur í TIVOLI, ymiskir tónleikarar.
Kl 22.00 Zion, útimøti vid Posthúsið.
Kl 23.00 Føroyskur dansur í Jómsborg.
Kl 23.00 TIVOLI letur aftur.
Kl 23.30 »Syngið við«, við luttøku av harmoniku og guitar, verður við posthúsið. Petur Jacobsen, búsetandi í Danmark, heldur midnáttarrøðu, aftaná verdur fýrverk heks verður brend..
Kl. 24.00 Dansur í Vágs Høll. Bygdarmenn spæla.
Kl. 01.00 Gamlamannadansur í Framtíðini. Trio spælir.

Sunnudagin 27. juni

Kl 11.00 Gudtænasta í Vágs kirkju.
Kl 14.00 Fólkafundur á Fløtuni Fríðu, røðari er Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður.
Eisini verður felagssangur.
Kl 14.00 Kunningarstovan í Vági skipar fyri. Aftaná er café umborð á Johonnu.
Kl 14.00 Vatnskutarar á fjørðinum – leigast á kaiøkinum.
Kl 14.00 - 18.00 Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir hevur listaframsýning í Kunningarstovuni (Gamli skúli).
Kl 14.00 - 21.00 Printa myndir á t-shirt, meðan tú bíðar, í hølið við høvðisvegin.
Kl 14.30 TIVOLI letur upp á kaiøkinum.
Kl 15.00 Johanna TG 326 ger túr út á Grønirnar, túrurin varir umleið 1 tíma. Fleiri túrar verða gjørdir um tørvir er á ti. Harmonikutónleikur, kaffi og smákøkur. Kostnaður 50,- fyri vaksin, børn ókeypis.
Kl 15.00 - 18.00 Pony ríðing á kaiøkinum
Kl. 16.00 BINGO, Svimjifelagið hevur bingo í Framtíðini.
Kl 16.00 -20.00 Suðuroyar RC -felag, framsýning í svimjihylinum.
Kl 16.00 Fótbóltsdystir millum sunnaru og norðaru helvt.
Kl 16.00 - 20.00 Sjósavnið opið á Seglloftinum í Stóra Pakkhús.
Kl 16.00 Café One Way í Zion
Kl. 16.00 - 18.00 Rundvísan, í Suðuroyar Ullvirki - søla av Sirri klæðum.
Kl. 17.00 - 20.00 Skálin vid Skálá hevur framsýning av Ruth Smith savninum í Gamla Skúla.
Kl 17.00 Livandi tónleikur í TIVOLI
Kl 18.00 Møti í Bethel.
Kl 18.00 Møti í Zion, við Annelise og Peter Madsen.
Kl 19.00 Konsert við Føroya Klarenettorkestri í VB-húsinum.
Kl 20.00 Livandi tónleikur í TIVOLI
Kl 20.00 Missiónshúsið, útimøti við Posthúsið
Kl 21.00 Tónleika Café í Stóra Pakkhúsi, við m.ø. Tróndi Enni.
Kl 21.00 Zion, útimøti við Posthúsið
Kl. 22.00 Frelsunarherðurin, útimøti vid posthúsið.
Kl 22.00 »Syngið við« í Missiónshúsinum. Eisini verður okkurt til matna.
Kl. 23.00 Føroyskur dansur í Jómsborg.
Kl. 24.00 Dansur í VB- húsinum, Vinmenn spæla.

Allir fótbóltsdystirnir á Jóansøku eru steypadystir.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

P/F Jógvan Weihe letur upp í nýggjum bygningi

Hildubjørg og Jógvan Weihe saman við børnunum, Ólavi, Ingvør og Gunnar Oluf , framman fyri nýggja bygningin í Stiðjagøtu. Ólavur og Gunnar Oluf arbeiða í fyritøkuni, meðan Ingvør er barnapedagog

Mynd: Jens Kristian Vang

Í dag, hósdagin 24. juni, letur handilsfyritøkan P/F Jógvan Weihe upp í nýggjum hølum í Stiðjagøtu í Havn. Í bygninginum er bæði heil- og smásøla

Kl. 9.00 hósdagin letur handilsfyritøkan P/F Jógvan Weihe upp í nýggjum stásiligum hølum í Stiðjagøtu í Havn.

Fyritøkan hevur tíggju tey seinastu árini hildið til í leigaðum hølum við Staravegin.

P/F Jógvan Weihe varð bleiv stovnað í 1991. Hetta var í ringastu tíð, meðan samfelagskreppan herjaði. Tað vóru tey bæði Hildubjørg og Jógvan Weihe sum stovnaðu fyritøkuna.

Jógvan er útbúgvin skrivstovumaður. Hann byrjaði í Landshandlinum í Havn í 1960, og frá 1963 arbeiddi hann sum ferðandi sølumaður hjá Landshandlinum. Hann arbeiddi eisini sum ferðandi sølumaður á heilsøluni hjá Kartni Winther.

Jógvan hevur eisini ferðast nógv kring landið fyri sína egnu fyritøka, og er hann helst tann føroyingurin, sum hevur arbeitt longst sum ferðandi sølumaður.

Fyritøkan selur so gott sum allar vørur sum t.d. fóð ur, fiskireiðskap til frítíðarfiskimenn, og alt til urtagarðsrøkt. Tá morðsnigilin byrjaði at gera um seg í Føroyum, vóru tey t.d. fyrst við Ferramol, sum hevur bøtt munandi um hendan snigilstrupulleikan. Sum nakað nýtt selur fyritøkan nú eisini arbeiðsklæðir, oljuklæðir, stivlar og annað til arbeiðs- og fiskimenn.

Fimm fólk starvast í nýggja bygninginum í Stiðjagøtu, ið er upp á tilsamans 900 fermetrar, har ein partur er í tveimum hæddum. P/F Jógvan Weihe er bæði heil- og smásøla. Handilin er opin gerandisdagar frá kl. 8.00-17.30 og leygardag frá 9.00-14.00

Paula Jespersen 85 ár

Í dag 24. juni fyllir Paula Jespersen í Trongisvági 85 ár. Paula er fødd 1919 í Trongisvági, dóttir Thominu og Óla Olsen. Thomina var ættað av Eiði og Óli av Tvøroyri.

Paula var áttanda barni av tíggju systkjum, 9 mánaðir gomul varð hon ættleidd av Paulinu og Martin Thorsteinsson í Trongisvági, tey áttu eingi børn.

Av teimum nýggju systkjunum hjá Paulu eru tríggjar systrar eftir á livi, tær eru Alexandra og Signy, báðar búsitandi í Vági, og Hannifia, búsitandi á Tvøroyri.

Paula giftist í 1940 við Arnhold Jespersen úr Trongisvági, tey eiga børnini: Martin, Jan, Pól, Rutt og Noomi.

Tey upplivdu ta stóru sorg at missa sonin Pól av sjúku í 1980, bert 32 ára gamal.

Paula og Arnhold eiga 14 ommu- og abbabørn og 8 langommu- og langabbabørn.

Sum ung lærdi Paula at seyma hjá Anettu Millá, og hevur hon seyma mong vøkur pløgg gjognum tíðina. Tá børnini vóru vaksin, fór hon út at arbeiða sum heimahjálp. 60 ára gomul tók hon koyrikort og keypti sær bil, men tíverri gjørdist hon avlamin sum 66 ára gomul og mátti selja bilin, men hon fall ikki í fátt.

Sum nakað slóðbrótandi keypti hon sær eina avlamissúkklu úr norska blaðnum »Familien«, og hevur hon havt stóra gleði av henni.

Hóast brek setist Paula ikki aftur, tá ið tað stendur henni í boði at ferðast – bæði heima og úti. Hetta verið seg í Ísrael og við pensionistafelagnum bæði í Noregi, Skotlandi og seinast í Íslandi. Á hvørjum ári møtist hon við øðrum pensioneraðum heimahjálparum, sum luttóku á skeiðum saman við henni, tá tær arbeiddu sum heimahjálparar. Eisini er hon á hvørjum ári á kvinnustevnu í Zarepta.

Vit ynskja henni hjartaliga tillukku á føðingardegnum og Harrans signing á lívskvøldinum.

x.

Guðrið Poulsen, keramikari:

Vanvart í Ribarhúsi

Sunnudagin 27. juni kl. 16 letur keramikkframsýning upp í Gallerí Ribarhús í Fuglafirði.

Tað er Guðrið Poulsen, keramikari, úr Havn sum sýnir fram nýggjastu verk síni.

Framsýningin rópast Vanvart, og sipar hetta heiti til tilfarið, brendi leirurin.

Á framsýningini eru smærri og størri skulpturar og veggmyndir úr steintoysleiri.

Framsýningin Vanvart er opin mánadag til fríggjadag frá kl.15 til 17.30 og leygardag millum 10 og 13. Sunnudag er opið frá kl. 14 til 18. Framsýningin endar sunnudagin 21.juli.

Erhard Jacobsen:

Kandidatur í bókasavns- og kunningarfrøði

Erhard Jacobsen, Tórshavn, hevur tikið prógv sum kandidatur í bókasavns- og kunningarfrøði (Cand.scient.bibl) á Danmarks Biblioteksskole

85 ÁR

Í dag, 24. juni fyllir Paula Jespersen, Trongisvágur 85 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

Dagurin

24. juni. Jóansøka. Føðingardagur Jóhannes Doyparans. Minningardagurin hjá halgimennum var vanliga deyðadagur teirra, men hjá Johannes Doyparanum er tað føðingardagurin, ið verður hildin, av tí at hann var heilagur longu í móðurlívi. Eftir bíbilskari frásøgn var Jóhannes Doyparin 6 mánaðir eldri enn Jesus, og tessvegna høvdu kirkjuligu myndugleikarnir gjørt av at halda føðingardagin hjá Jóhannesi áttanda dagin fyri 1. juli, og tað er júst 6 mánaðir fyri føðingardag frelsarans tann 24. desember.

Føðingardagarnir verða verða báðir hvør í sínum lagi hildnir um sólstøður.

Um øll Norðurlond verða hildnar summarveitslur um jóansøku. Jóansøkustevna, sum hon verður hildin nú á døgum, varð hildin á fyrsta sinni í 1925 á Tvøroyri.